# Sambands-listin klárur

**Sambandsflokkurin liðugur við uppstillingina í Suðurstreymoy**

KOMMUNUVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Føroya Væl - valfelag Sambandsfloksins í Suðurstreymoy stillar 12 valevni upp til kommunuvalið í Tórshavnar Kommunu 9. november - níggju mans og tríggjar kvinnur. Býráðslimirnir Heðin Mortensen, Høgni Mikkelsen og Beate L. Samuelsen stilla uppaftur. Fjórði býráðslimur Sambandsfloksins, Schuman Hjaltalin, stillar ikki uppaftur. Hann hevur sitið 12 ár í býráðnum

Listin sær annars soleiðis út:
1. Heðin Mortensen býráðslimur Tórshavn
2. Høgni Mikkelsen, býráðslimur Tórshavn
3. Beate L. Samuelsen býráðslimur Tórshavn
4. Annfinn Brekkstein, borgarstjóri Velbastaður
5. Bent Jákup Hansen, Argir
6. Bjørg Dam, Tórshavn
7. Carina Fagralón Kollafjørður
8. Bjarti Thomsen, Nólsoy
9. Jóhan P. Johannesen, lærari Argir
10. Steinfinn Mittelstein, sølumaður Tórshavn
11. Rasmus A. Joensen, skrivstovumaður Tórshavn
12. Hans Albert Hansen, búskaparfrøðingur Tórshavn

# Barnadansur in byrjar aftur



Byrja verður fríggjakvøldið 8. oktober kl. 20.00

Endamálið við hesum tiltaki er at læra børnini kvæðaskap okkara og harvið kveikja teirra áhuga og varveita kvæðini, sum ein livandi part av mentan okkara.

Tað er Dansifelagið í Havn og Norðurlandahúsið, sum øll árini hava skipað fyri barnadansinum.

Vónandi møta børn og foreldur fjølment upp.

# Kambsdal í Leikalund



**Fríggjadagin, 8. oktober letur listaframsýning við fuglfirðinginum Heðini Kambsdal upp**

TÍÐINDASKRIV
*Leikalund*

**Klaksvík:**
Heðin Kambsdal er føddur í 1951 og hevur í mong ár fingist við málningalist. Hann hevur verið við á nógvum varmakelduframsýningum, ólavsøkuframsýningum, várframsýningum, Lionsframsýningum og eisini í Smiðjuni í Lítluvík. Harafturat hevur hann sýnt fram sínar myndir uttanlanda, millum annað í Lemvig, Herning, Ålborg, Hjørring og Frederikshavn

Við á framsýningini í Leikalund hevur Heðin 15 nýggjar oljumálningar.

Framsýningin letur sum nevnt upp fríggjadagin 8. oktober klokkan 16.00 og eru øll hjartaliga vælkomin at hyggja framvið, síggja framsýningina, fáa ein kaffimunn og heilsa uppá listarmennirnar. Myndirnar eru til sølu og eru at síggja í vanligari upplatingartíð frá mánadag til hósdag frá 10 til 17:30, fríggjadag frá 10 til 19:00 og leygardag frá 10 til 13. Framsýningin verður hangandi allan oktober mánaða.

Framsýningin, ið tekur við aftaná framsýningina hjá Heðini, verður við Astrid Luihn.

# Fimm fólk úr starvi

**Skerjingar á á fíggjarlógini elva til, at fimm fólk færri verða í starvi á Fiskirannsóknarstovuni**

UPPSAGNIR

Undir viðgerðini av fíggjarlógini fyri 2004 fyrr í ár vórðu skornar kr. 500.000 av uppskotinum frá Landsstýrinum til vanliga rakstурin hjá Fiskirannsóknarstovuni. Samstundis vóru aðrar stórar skerjingar framdar í ávísum verkætlanum.

– Í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2005 eru omanfyrinevndu skerjingar av samlaða virkseminum tiknar til eftirtektar, umframt at hædd ikki er tikin fyri lønarhækkingunum. Stovnurin kemur sostatt í 2005 at hava minni pening at ráða yvir, enn hann við verandi manning hevur ráð til. Neyðugt er tí við skerjingum í talinum av starvsfólki, sigur Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni.

Út frá hesi fortreyt eru fýra fólk á stovninum søgd úr starvi, meðan eitt fólk fer frá fyri aldur. Sostatt vera í 2005 fimm starvsfólk færri á Fiskirannsóknarstovuni.

# Skúlar pluss mál pluss grannar pluss pengar

TÍÐINDASKRIV

Nordplus er evnið á fyrsta almenna fundinum hjá Norrøna Felagnum í Føroyum í vetur.

Á fundinum í Norðurlandahúsinum hóskvøldið 7.oktober kl.19.30 fer Henrik Neiiendam Andersen frá Cirius-Danmark at greiða frá um Nordplus skipaninar. Hann fer at eisini at geva teimum, sum vilja tað, vegleiðing í at søkja um pengar frá Nordplus.

Norðurlendska ráðharraráðið bjóðar fimm møguleikar at søkja um studning frá Nordplus í ár, næsta ár og í 2006.

Nordplus er ætlað skúlafólki, tað vil siga næmingum og lærarum, og teimum, sum eru góð við norðurlendsku málini.

Endamálið við stuðlinum er at styrkja norðurlendska felagsskapin og samleikan við støði í søguligu, mentanarligu og demokratisku felagseyðkennunum hjá Norðurlondunum. Kjarnin er flytføri og netverk.



*Henrik Neiendam Andersen fer at greiða frá um Nordplus*

Í Nordplus eru fimm stuðulsskipanir:

Nordplus Junior er ætlað lærarum og næmingum í fólkaskúlum, miðnámsskúlum og í yrkisútbúgvingum. Næsta umsóknarfreist er 15. oktober 2004.
Nordplus skal menna samstarvið millum lærarar og studentar í hægri útbúgvingum. Næsta umsóknarfreist er 1.februar 2005.

Nordplus Vaksin er ætlað at menna samstarvið um fólksliga upplýsing og undirvísing fyri vaksin. Næsta umsóknarfreist er 1.mars 2005.

Nordplus Granni er serliga ætlað at menna samstarvið við grannarnar eystanfyri, fyrst og fremst við Baltalondini, men eisini við útnorður-Russland. Samstarvið er fyri allar útbúgvingarskipanir. Næsta umsóknarfreist er 1.februar 2005.

Nordplus Mál skal menna støðuna hjá norðurlendsku málunum í Norðurlondunum og styrkja málini í altjóða høpi. Næsta umsóknarfreist er 15. oktober 2004.

Í Føroyum kunnar og vegleiðir Altjóða Skrivstovan www.ask.fo um allar fimm Nordplus skipanir.

Í Danmark stendur Cirius www.ciriusonline.dk fyri kunningini og vegleiðingini. Henrik Neiiendam Andersen, sum verður á almenna fundinum hjá Norrøna Felagnum í Norðurlandahúsinum hóskvøldið, arbeiðir hjá Cirius í Danmark.

Sosialurin
www.sosialurin.fo





*Árni Dam, ið er helst royndasti føroyingurin innan shipping-virksemi í Føroyum, heldur tað verða alneyðugt, at ein fríhavn verður sett á stovn í Føroyum.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Neyðugt við fríhavn í Føroyum

**Ein tann royndasti føroyingurin innan shipping-virksemi, Árni Dam, sigur tað verða alneyðugt, at ein fríhavn verður sett á stovn í Føroyum sum skjótast. Hann sigur, at ein fríhavn kann skapa eina rúgvu av nýggjum arbeiðsplássum**

FRÍHAVN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Herfyri læt Árni Dam saman við øðrum upp skrivstovu Yviri við Strond í Havn, sum hann rópar Faroe Agency. Endamálið við nýggju skrivstovuni er fyrst og fremst at veita tænastur til útlendsk skip, ið koma til Føroya. Árni Dam hevur í nógv ár fingist við slíkt virksemi, og hann sigur, at um føroysku myndugleikarnir taka stig til at seta á stovn eina fríhavn, er møguleiki fyri at útvega eina rúgvu av nýggjum og hart tiltrongdum arbeiðsplássum.

Árni Dam greiðir frá, at útlendsk reiðaríir hava stóran áhuga fyri Føroyum, og síðani nýggja skrivstovan læt upp, hava teir fingið hópin av uppringingum úr útlandinum.

– Tað gongur skjótt í hesari vinnuni við at fáa tíðindini um eina nýggja skrivstovu av hesum slag runt til røttu viðkomandi, sigur Árni Dam.

Faroe Agency skal fyrst og fremst virka sum port agents fyri fremmand skip. Tað vil siga, at teir taka sær av øllum tí praktiska viðvíkjandi pappírum, loyvum, møguligari útskifting av manning saman við Atlantic Airways, proviant og øðrum í sambandi við, at eitt fremmant skip kemur til Føroya.

Tað er eingin loyna, at Árni Dam í nógv ár hevur havt rættuliga nógv samstarv við russar, og millum annað er hann umboðsmaður hjá teimum mongu russisku skipunum, ið liggja í Nólsoyarfirði.

– Russarnar havi eg fingist við síðani 1978, so teir kenna meg. Teir ringja eisini í heilum og spyrja, um vit kunnu taka okkum av øllum tí praktiska, og tað hevur einki upp á seg, tí hjá okkum er tað rein rutina, sigur royndi shippingmaðurin.

## Óneyðugar forðingar

Árni Dam sigur, at um vit ikki høvdu havt so nógvar óneyðugar forðingar, høvdu føroyingar kunna vunnið heilt fitt av peningi burtur úr øllum teimum mongu skipunum, ið eru her á okkara leiðum. Hann vísir á, at varð til dømis ein fríhavn sett á stovn, hevði tað uttan iva merkt eina rúgvu av nýggjum arbeiðsplássum.

– Eg eri óteljandi ferðir blivin spurdur av reiðarum, um vit ikki hava eina fríhavn í Føroyum, tí so høvdu teir sent síni skip inn hagar at avskipa fisk, bunkra olju og annað. Men vit hava øll møgulig avgjøld, ið merkja, at tað ikki loysir seg hjá fremmandu skipunum at koma hagar. Eg veit til dømis, at høvdu vit eina fríhavn, høvdu allarhelst øll tey russisku skipini, ið eru við Føroyar, komið hagar at bunkra olju. Tilsamans brúka hesi skip eitt stað millum 150.000 og 200.000 tons av olju árliga, og tað er eyðsæð, at tað hevði kastað nógv av sær her á landi, sigur Árni Dam.

Eisini fílist Árni Dam á tey sonevndu BIB-gjøldini, ið verða kravd fyri eitt nú triðjalandsfisk, ið verður koyrdur á goymslu í Føroyum, áðrenn hann verður sendur við farmaskipi til eitt annað triðjaland. Hetta BIB-gjaldið inniber, at kemur til dømis ein russiskur bátur við 1.000 tonsum av blokki, ið skal goymast í Føroyum, áðrenn hann verður avskipaður víðari til eitt nú Kina, skal Heilsufrøðiliga Starvsstovan hava okkurt um 15.000 krónur fyri hetta, tí stovnurin hevur eftirlit við tey trý støðini í Føroyum, har slíkur fiskur kann umskipast.

– Talan er ofta um fisk við einum lágum kiloprísi, og tá ið so hetta gjald verður lagt omaná, gerst tað fullkomiliga óhugsandi hjá fremmandu skipunum at avskipa fiskin í Føroyum. Hinvegin hevði onki avgjald verið, høvdu tey avskipað her, og so var nakað av arbeiði til fólk á landi, og harumframt var eisini møguligani eitt sindur av farmi til føroysku farmaskipini. Tað er burturvið, at vit krevja slík avgjøld fyri transitfisk, sigur Árni Dam.

– Eg havi grenjað um eina fríhavn í nógv harrans ár, men tað tykist ikki sum um, at tað er nakar, ið lurtar. Russarnir, ið eg samstarvi við, siga, at teir kundu tonkt sær, at tað vóru okkurt um tríggjar fríhavnir í Føroyum. Tað er einki at ivast í, at vit so høvdu fingið skip úr øllum møguligum londum hagar at avskipa, og tað hevði viðført, at nógv arbeiðspláss komu upp at standa, og so hevði tað sjálvsagt rakt ymiskar hjávinnur, ið eru knýttar at skipum, sigur royndi shippingmaðurin.

# Skutari fór upp í royk



*Førarin av skutaranum stendur saman við einum løgreglumanni og eygleiðir rovini av skutaranum, sum fór fullkomiliga upp í royk*
*mynd: Jens Kr. Vang*

FERÐSLUÓHAPP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Stutt eftir klokkan átta mikumorgunin hendi eitt ferðsluóhapp á Argjum, tá ið ein ungur drongur á skutara rendi á ein bil, sum koyrdi beint framman fyri. Eldur kom í skutaran, sum fór fullkomiliga upp í royk

Óhappið hendi í brekkuni í Støðlagøtu úti á Argjum. Drongurin á skutaranum rendi á bilin, sum koyrdi beint framman fyri. Skutarin koppaði, og av einari ella aðrari ókendari orsøk kom eldur í skutaran. Sløkkiliðið varð boðsent, men skutaran stóð ikki til at bjarga, og hann fór fullkomiliga upp í royk.

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at talan er um eina rættuliga sjáldsama hending, tá ið ein skutara brennist upp av at koppa. Somuleiðis verður upplýst á politistøðini, at tað er eink, sum bendir á, at skutarin var ólógligur. Eingin fólkaskaði var av óhappinum, men sum áðurnevnt fór skutarin fullkomiliga upp í royk, og persónbilurin fekk eitt sindur av skaða.